# Leirvíkar Skúli

**Samognarbøur 4 · 520 Leirvík**

## Søkt verður eftir lærarum og námsfrøðiligum stuðlum til Leirvíkar skúla skúlaárið 2009/10

**4 lærarastørv, tíðaravmarkað**

**3 námsfrøðiligir stuðlar**

Eitt starv fulla tíð fyri lærara í farloyvi

Eitt starv fulla tíð til tríggjar næmingar við serligum tørvi (autismu). Her er talan um nýggja deild, sum kemur at halda til í hølunum á Kulibakka 15, nú barnagarður Her verða eisini tveir stuðlar fulla tíð.

Eitt starv umleið fulla tíð vegna avlopstímar. Endaliga tímatalið verður avgjørt 1. septembur.

Eitt starv 1/8 til 31/12 2009 uml. 20 tímar fyri lærara í barnsburðarfarloyvi.

Ein námsfrøðiligan stuðul 20 tímar/viku til næming við serligum tørvi.

Tveir námsfrøðiligar stuðlar 19,5 tímar/viku hvør. Hesir koma at arbeiða á nýggju deildini fyri næmingar við autismu. Deildin kemur at halda til í hølunum á Kulibakka 15, nú barnagarður. Um talan verður um heildagstilboð til hesar næmingar, so verður møguleiki at uppnormera hesi størv innan frítíðartilboðið.

**Søkt verður eftir lærarum/stuðlum, sum**

- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við starvsfólk skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans.
- Duga at samstarva og eru fyrikomandi.
- Eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum.

**Vit vænta, at tú ert**

- Fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur.
- Virkisfús/ur og hugað/ur fyri toymissamstarvi.
- Vilt vera við til at menna eftirmetingar.
- Í samstarvi við leiðsluna og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan.

**Harumframt skulu lærararnir hava førleika at undirvísa í nøkrum av hesum lærugreinum:**

| | | |
|---|---|---|
| føroyskum | støddfrøði | donskum |
| enskum | søgu | náttúru og tøkni |
| handarbeiði | smíð | ítrótti og svimjing. |

**Førleikakrøv**

Læraraútbúgving og linjulestur í onkrari av nevndu lærugreinum.

Royndir í føroyska fólkaskúlanum.

Læraralesandi, sum taka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini.

Stuðularnir: Viðkomandi útbúgving/starvsroyndir.

**Lønar- og setanartreytir:**

Lærararnir verða løntir sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tey, sum sett verða, verða sáttmálasett, uttan so, at tey frammanundan eru tænastumenn í fólkaskúlanum.

Stuðlarnir verða løntir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pedagogfelagið.

**Umsóknir**

Umsóknir við c.v., avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til Leirvíkar skúla merkt: Til fyrstalæraranum.

Umsóknarfreistin hósdagin 30. apríl 2009, kl. 18.00.

Áhugað kunnu venda sær til Leirvíkar skúla, tlf 443234 ella 730060 og spyrja eftir Fríðfinni Johnsson.

**Leirvíkar skúli** hevur komandi ár uml. 90 næmingar, 10 lærarar og 3 stuðlar Tú kanst lesa meira um skúlan á heimasíðuni www.skulin.fo/lei

---

**Vestmanna Skúli**

Toftavegur 12 · FO - 350 Vestmanna · Føroyar
Tlf. 470100 · Fax: 470101 · vestmanna@skulin.fo

# LÆRARASTØRV í Vestmanna Skúla

**lýst leys til setanar frá 1. august 2009.**

Søkt verður eftir 3 lærarum, tveimum í tíðaravmarkaðum fulltíðarstarvi og einum í tíðaravmarkaðum parttíðarstarvi, endaliga tímatalið ásett eftir 1. sept.

- fyri lærarar í farloyvi, lækkað tímatal, stuðulstímar og avlopstímar

**Søkt verður eftir lærarum, sum**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Harumframt skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum:**

- ítrótt og svimjing, dreingir
- týskt, føroyskt, enskt og danskt
- náttúru/tøkni, alisfrøði og evnafrøði
- træ- og jarnsmíð og motorlæru
- tónleik, heimkunnleika, handverk og list
- tímar vegna serligan tørv og standa fyri lesi- og rokniroyndum
- vera flokslærarar

**Førleikakrøv:**

Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Tó kunnu læraralesandi, ið lúka prógv í summar, eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir**

Setanarøkið er Vestmanna Skúli. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tíðaravmarkaðu størvini verða sett fyri skúlaárið 2009 - 2010.

**Umsóknir**

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 1. mai 2009, kl. 16.00.

Fleiri upplýsingar um størvini fært tú við at ringja til Vestmanna Skúla tlf. 470100, fartlf. 230100, til varaskúlastjóran fartlf. 230101 ella við at senda teldupost til skúlastjóran olavur.winther@skulin.fo

**Vestmanna Skúli** hevur komandi skúlaár umleið 192 næmingar og um 22 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/ves/ Vestmanna Skúli er kendur fyri at vera næmingavinarligur og grønur skúli. Skúlin arbeiðir í løtuni við hesum evnum: at menna trivnaðin, byrjanarundirvísingina, samstarvið við vinnulívið og at geva næmingunum fjølbroyttar avbjóðingar.

---

**Vágs skúli**

# Lærarastørv í Vágs-skúla

**lýst leys til setanar frá 1. august 2009**

- 2 lærarar í tíðaravmarkað starv við fullum tímatali skúlaárið 2009/2010 vegna farloyvi, lækkað tímatal og serligan tørv.
- 1 lærari í tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2009/2010 vegna lækkað tímatal og avlopstímar. Endaliga tímatalið verður ásett 1.sept. 2009

**Søkt verður eftir lærarum, sum**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Førleikakrøv**

Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika

**Lønar- og setanartreytir:**

Størvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**

Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi onsdagin 29. apríl kl 10.00

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Óla í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 373192 ella 733030

Vágs skúli hevur komandi skúlaár umleið 223 næmingar í 12 flokkum og 24 lærarar.

**Vágs skúli**

Vágsvegur 32
900 Vágur

---



# Triumph Daytona 675 Sport

**Árg:** 08/2006 **Litur:** Reytt
**Km:** 1.100 **Motor:** 675cc / 128hk

**Prísur. Kr. 90.000,-**
**Tlf.: 21 57 57**